**Ísak Sambleben:**



*- Góð konsert! Serstakliga varð eg yvirraskaður yvir klaverkonsertina! Jóhannes spældi heilt fantastiskt!*
*- Tá lagnusymfoniin varð spæld, merkti man, at orkestrið spældi seg heitari og heitari fyri síðan at enda við einum braki í tí stóru finaluni.*



**Heri Joensen og Sigrid Dalsgaard:**

*- Einastandandi konsert! Fimta symfoniin hjá Beethoven er eitt sera kraftmikið verk, og tað eydnaðist ómetaliga væl hjá orkestrinum at bera fram hesa orku.*

*Tað var ikki bert Beethoven, men eisini Jóhannes Andreassen, sum fingu Hera og Sigrid at fara til konsert.*

*- Tað er stutt síðan at vit fluttu heim aftur til Føroyar, so vit hava ikki verið fastir áhoyrarar hjá Føroyar Symfoniorkestri, men eftir konsertina í dag er eingin ivi um at vit fara aftur.*



**Magnus Pauli Magnussen:**

*– Tað var eitt stór upplivilsi! Serliga tann seinasti satsurin var fantastiskur!*

*Magnus Pauli er ikki uppvaksin við klassiskum tónleiki, men síðan sonurin (Dávur Magnussen, red.) fór at spæla við Føroya Symfoniorkestri, er hann javnan áhoyrari til konsertirnar:*

*– Sonur mín plagar at flenna at mær, tí eg havi ikki forstand uppá tað.*

*Magnus Pauli leggur afturat, at tað er musikkskúlanum fyri at takka, at tað yvirhøvur er eitt Føroya Symfoniorkestur og fýlist í hesum sambandi á forstáilsi fyri tónleikinum:*

*– Tá ið pengar skulu sparast, so gongur tað útyvir tónleikin. Tað er stórt spell, tí tað tekur langa tíð at byggja upp, men onga tíð at bróta niður.*



*Tað var totalt útselt tá ið Føroya Symfoniorkestur saman við Jóhannes Andreasen sunnudagin hevði sett Beethoven stevnu. Tað var gott, tí tað, sum varð borðreitt áhoyrarunum, var einastandandi.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Einastandandi

**Á pappírinum var tað klaverspælarin og komponisturin Ludwig van Beethoven (1770-1827), ið varð settur í hásætið, tá ið Føroya Symfoniorkestur hevði konsert í Norðurlandahúsinum sunnudagin 31. oktober. Men tá avtornaði var tað serstakliga Jóhannes Andreasen, umframt Bernharður Wilkinson og Føroya Symfoniorkestur, sum stjól stórsta partin av myndini**

KONSERTUMMÆLI
*Tór Verland Johansen*

Við ouverturuni til syrgileikin "Egmont" eftir Goethe, Op. 84, fekk Føroya Symfoniorkestur eina sera góða byrjan. Spælið var neyvt, intonatiónin serstakliga góð og við Bernharði á odda gjørdist overturan ógvuliga dynamisk og fjølbroytt. Tað boðaði avgjørt frá góðum.

## Jóhannes Andreasen í heimsklassa

Næst á skránni var klaverkonsert nr. 1, Op. 15, ið Beethoven skrivaði sum 25 ára gamal. Í veruleikanum var tað sum pianistur og ikki sum tónaskald, at Beethoven av fyrstan tíð gjørdist gitin. Av góðum orsøkum eru ongar upptøkur av sjálvum Beet-hoven, men torført er at ímynda sær, at hann kann hava gjørt tað nógv betur enn okkara Jóhannes Andreasen.

Tað virtuosa og kensluborna spælið, sum Jóhannes borðreiddi við, bergtók fólkið so mikið, at longu eftir fyrsta sats byrjaðu summi spontant at klappa - sum um tey júst høvdu verið vitni til eina mega feita jazzsolo, ið bara mátti rósast her og nú. Tað stóð óiva á hjá nógvum av teimum, ið vita at tað er "fy-fy" at klappa, áðrenn allir satsir eru spældir, tí tað var veruliga einastandandi spæl. Fólk sótu sum á nálum.

Tað vóru nevnliga ikki bara samanhangandi tónar, men veruligur tónleikur, sum floymdi úr stóra flygilinum. Jóhannes var eitt við flygilið - eins og orkestrið og Jóhannes vóru ein eind. Serstakliga var tað vakurt at hoyra, hvussu væl bassurin á flygilinum og fagottin fylgdust. Sum var tað sami persónur, ið spældi á bæði ljóðførini.

Eftir at Bernharður hegnisliga hevði vent sær ímóti áhoyrarunum og við einari léttari og høfligari rørslu hevði givið teimum tekin um, at Jóhannes og orkestrið ikki skuldi fagnast - enn, varð skjøtul settur á næsta satsin. Í tí stilla largo, sum gongur í tí torføra Asdur, var tað ein fragd at hoyra hvussu væl orkestrið megnaði at fylgja Jóhannesi. Av og á fekk ein ein feril av, hvussu krevjandi tað er hjá einum dirigenti at fáa orkestri í hesum seina tempo at leggja seg heilt tætt at spælinum hjá solistinum, men við tí neyva og dugnaliga Bernharði sum bindiliði, eydnaðist tað avbera væl.

Triði og seinasti satsur var sum tann fyrsti: Stutt og greitt, heilt einastandandi! Meðan orkestrið orkumikið og dynamiskt dundraði, dansaðu fingrarnir hjá Jóhannesi upp og niður á klaveriaturinum, og góvu áhoyrarunum eina kenslu av, at hesin maður hevði eina rúgvu av yvirskoti. Sum var tað tað léttasta í verðini, ja sum um hann bara stuttleikaði sær saman við Beethoven. Og óivað gjørdi hann tað. Í øllum førum var tað sera hugtakandi at uppliva og hoyra, at vit her á okkara klettum hava ein virtous í heimsklassa! Ótrúligt!

## Symfoni nr. 5 í c-moll, Op. 67

Eftir steðgin var lagnusymfoniin á skránni. Tað var við eini undarligari kenslu at farið var inn aftur í salin. Vónirnar eftir fyrru helvt vóru í hæddini, men samstundis var tað eitt ivamál um nú eisini orkestrið - uttan Jóhannes Andreasen - einsamalt kundi halda tað einastandandi høga støðið.

Óneyðugt var at stúra. Tað kundi - og gjørdi - tað! Tað var deiligt at hoyra og síggja Føroya Symfoniorkestur spæla hesa kendu og krevjandi symfoni.

Tað sigst, at teir fýra fyrstu tónarnir - da da da daaaam - er lagnan, ið bankar uppá dyrnar. Men eisini verður sagt, at hesir tónar boða frá nýggjum mátti og nýggjum degi. Soleiðis sýntist tað, tá ið orkestrið við Bernharði sum skipara, meistarliga gav áhoyrarunum krás fyri oyra.

Kontrabassarnir og cello'irnar løgdu djúpar lunnar undir, og við fyrstu violinunum á odda struku allir strúkararnir létt avstað fyri síðan at venda aftur til buldur og brak saman við paukum og træ- og messingblásarunum.

Mitt í øllum rokanum ein orkumikil Bernharður, ið við ótrúligum akrobatiskum rørslum stjórnaði, so tað stóð eftir. Stundum var hann sum ein risi á at líta og aðra tíðir sum ein lítil mús. Tað er einki at ivast í, at Berharður eigur ein stóran part av æruna av, at Føroya Symfoniorkestur hevur fingið nýggjan mátt og nýggja megi.

## Besta konsertin higartil

Samanumtikið var tað í allar mátar ein framúr góð konsert. Hóast tað er vorið so væl umtókt at geva stjørnur til ditt og datt, vil eg ikki gera tað. Men um eg skuldi gjørt tað, so hevði eg nokk givið seks stjørnur av seks møguligum. Orsøkin er einføld: 53. konsertin hjá Føroya Symfoniorkestur var møguliga tann allar besta hjá orkestrinum nakrantíð. Ella kanska réttari: Besta higartil. Spennandi verður nevnliga at hoyra, hvat liggur fyri framman.



*Av góðum orsøkum eru ongar upptøkur av sjálvum Beethoven, men torført er at ímynda sær, at hann kann hava gjørt tað nógv betur enn okkara Jóhannes Andreasen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Føroyski kalendarin 2005 er komin



*Nú er eisini føroyskur Mayland-kalendari at fáa*

Griffilin í SMS hevur latið gjørt ein serføroyskan kalendara fyri 2005. Ein kalendari, sum ger tað léttari at samskipa arbeiði, frítíð og familju. Og ein kalendari, sum gevur tær nógvar upplýsingar.

Kalendari 2005 er ein dagkalendari við einum degi á hvørjari síðu. Sniðið er snotuligt, og plastperman við snyrilsryggi ger hann fittligan og léttan at handfara.

Til dagarnar eru hentar upplýsingar skipaðar eftir ávísum leisti. Her eru føroyskir merkisdagar og halgidagar. Um týsdagin 18. januar stendur til dømis: Gamli trettandi. Gomlu jól enda. Vilt tú vera ríkur, skalt tú gomlu trettandu nátt ganga út og sita á kjørbreyt. Leygardagin 1. oktober stendur: Loyvt at skjóta lunda, lomviga og álku til 20. januar, og skarv til 30. november.

Annars er mangt annað at finna aftast, sum vit eru von í slíkum kalendarum. Eingin føroyskur kalendari uttan streymtalvu og haraftrat eru føroysk postnummur, mát og vekt, hent telefonnummur og kort við tímaskifti við.

Kalendari 2005 er prentaður hjá Mayland í Danmark, sum gevur líknandi kalendarar út. Kalendarin fæst í bókahandlum kring landið.

# Valfundur í Sørvági

**Veljarafundur í samband við komunuvalið verður í Sørvági hóskvøldið klokkan 19.00 Umboð fyri allar listarnar, sum stilla upp til kommunuvalið, verða við á fundinum**

VALFUNDUR
*Edvard Joensen*

Fyri fyrstu ferð verður almennur veljarafundur í samband við kommunuval í Sørvági. Allir fýra listarnir, sum stilla upp til valið, verða umboðaðir á fundinum, sum Torry Niclasen, skúlastjóri, fer at stjórna.

Veljarafundurin verður í skúlanum klokkan 19.00, siga fyrireikararnir. Fundurin verður skipaður sum vanligir veljarafundir plaga at vera.

Fyrst fáa listarnir eitt korter í part at leggja síni sjónarmið fram. Síðan verður høvi hjá almenninginum at seta teimum, sum sita við pallborðið, spurningar. Til hetta er sett av eini trý korter til ein tíma, siga fyrireikararnir.

Sagt verður, at tað fyrr hevur verið roynt at fáa ein slíkan fund í lag, men áhugi hevur ikki víst seg at verið fyri tí. Serliga millum valevnini hevur hann verið lítil.

Tað er óheppið, at so er, siga fyrireikararnir. Tí slíkir fundir eiga at vera við til at økja áhugan fyri veruligum kommunalpolitikki og ikki bara familjupolitikki, sum ein teirra, sum stendur fyri, tekur til. Her hava fólk møguleika at leggja sínar visiónir fyri almenningin, og veljarin hevur møguleika at minna tey, sum skulu mynda bygdarráðið komandi fýra árini, á, hvat hann heldur vera av týdningi at fáa framt.

Men hesaferð er hugburðurin so vendur soleiðis, at allir listar hava játtað at vera við á fundinum, og tað kann bara økja almenna áhugan fyri kommunalpolitikki, meta fyrireikararnir av fyrsta almenna kommunuvalfundinum í Sørvági.